# Talvfelagið Føroyar í 2. deild

**Eftir eitt sera dramatiskt síðsta umfar eydnaðist tað liðnum hjá okkum í Keypmannahavn at vinna 3. deild**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Málið í ár hjá okkum í Talvfelagnum Føroyum undan kappingarbyrjan var uppflyting. Nevndin í Talvfelagnum Føroyar løgdu seinasta summar eina trý ára plan, har endamálið er umboðan 1. deild í 2003, og byrjast skuldi í ár við uppflyting til 2. deild.

Við Regin Reinert á odda hevur TF í samstarv við TSF - eina peningajáttan sum skal brúkast at løna telvarnar - fingið so góðar menn sum John Arna Nilssen og Heina Olsen við aftur í felagið, eftir at teir hava umboðað onnur feløg við pengapolitikki. Umframt hesar fór Flóvin Tór Næs niður í lestrarørindir, so vónirnar vóru sera góðar.

Vit byrjaðu eisini væl, tveir 6-2 sigrar, síðani vunnu vit týðandi dyst ímóti Ballerup, sum vóru okkara einastu veruligu kappingarneytar. Vit vunnu hendan dyst trygt 5_-2_. Síðani skuldi alt verið eftir planini, eftirsum vit møttu Saxo, sum lógu fastir í botninum, men so skuldi ikki verða. Teir møttu bert við sjey monnum, Eyðun Nolsøe vann tí uttan dyst, men tað forðaði ikki teimum úr Saxo við bert sjey monnum at fáa eitt sensationelt úrslit, 4-4. Teir høvdu minst 300 minni enn vit í miðalrating. Eitt vána úrslit hjá okkum, sum gav Ballerup møguleikan aftur.

## Ballerup framanfyri

Tað væntaða hendi í fimta og triðseinasta umfari, nevnliga tað at Ballerup fór skutin framum okkum. Vit vunnu okkara dyst 5,5-2,5 ímóti KS, meðan Ballerup vann 6-2 ímóti einum botnliði. Hálvt stig aftanfyri og bert tvey umfør eftir. Tað bleiv skotið við skørpum hjá ikki-leikandi liðformanninum Regin Reinert. Hetta skumpaðu helst okkum eitt petti, tí í næstseinasta umfari hølvaðu vit Vanløse av, 7-1, sum sjálvsagt er eitt gott úrslit, men útfrá ratingtølunum hjá Vanløse, átti vit minst at havt hesi sjey stig, so tað var í lagi. Tað einastandandi hendi í Farum, tá Ballerup bert fekk 4-4 ímóti júst Farum. Tað merkti at vit nú lógu heili 2,5 stig fremstir undan seinasta umfari, og høvdu vit tískil tað eina beinið í 2. deild.

## Dramatikkur

Tað var sum bumbur aftaná bumbur brustu í seinasta umfari, sum eins og í Føroyum er felagsumfar. Vit møttu Nordkalotten, sum hava GM Johnny Hector og IM Stefna Brynell úr Svøriki á styrkilistanum. Tíbetur var bert GM Hector á liðnum, meðan Brynell leikti í svensku liðkappingini.

Tann fyrst bumban brast longu eftir einum tíma, og bert 13 leikum í mínum egna talvið. Eg hevði seks stig av seks møguligum, og skuldi tí bert vinna hetta seinasta talvið um fult stigartal skuldi eydnast. Við hvíta fólkinum gavst eg eftir bert 13 leikum tá frúgv mín bleiv fangað. Ein dyggur smeitur fyri felagið og fyri meg persónliga. Síðani slapp eg mær vekk frá ljósinum, inn í kantinu, men stuttur varð friðurin, tí Bogi Ziska kom við tíðindunum at hann hevði givið talvið, og stutt eftir komu boðini at Eyðun Nolsøe hevði mist mann, og fór at tapa.

Tríggjar bumbur innan 5 minuttir, meðan Ballerup hevði trygga 3_-_ leiðslu í sínum dysti. Vit tosaðu um kollektivt kollaps, har vit nú ikki væntaði at uppflytingin skuldi eydnast.

Men síðani vendist spakuliga, Heini Danielsen vann sítt talv, og Ballerup hevði tapt á fyrsta borði. Men enn var einki avgjørt. Síðani megnaði Jóan Hendrik Andreasen snilt at vinna eitt hálvavegna deytt talv, og stutt eftir vann Heini Olsen á Kai Bjerring á øðrum borði. John Arni stríddist manniliga og hevði vinnandi støðu ímóti GM Hector, men snávaði, og tapti tíverri. Talvið er við í blaðnum í dag.

Støðan var nú 3-4 til Nordkalloten og Ballerup hevði 5-2 leðslu, sum merkti at vit í hesari løtu lógu hálvt stig fremstir. Terji Petersen hevði betri støðu og kundi valla tapa, meðan síðsta talvið hjá Ballerup svingaði. Til alla lukku endaði dysturin 5,5-2,5 til Ballerup, og eftir hetta tók Terji javnt í betri støðu. Vit taptu okkara dyst, men líkaglaðir vóru vit. Vit ryktu upp, og farið varð síðani heim til liðformanin har gildi varð.

## Samanumtikið

Undan hvørjum dysti hittust vit til morgunmatar saman, og hetta royndist væl. Tað styrkir um samanhaldið, moralin, og kann eg bert heita á tey føroysku feløgini at gera hetta sama.

Vit høvdu tvey ring úrslit, og fimm góð, og í miðal fingu vit beint undir 5,5 fyri hvønn dyst, sum má sigast at vera á góðari leið.

Manningin á liðnum var ikki tann sama gjøgum kappingarárið. Eftir jól valdi Flóvin ikki at telva við, og tá var alt fyri eitt send boð eftir Jóan Hendrik, sum lesur í Árhus. Hann var okkum hollur stuðul, og tað sama kann sigast um super-sub Finnbjørn Vang, sum lekti fýra talv fyri Terja.

### Endastøðan í toppinum

| | |
|---|---|
| 1. TF | 37,5 |
| 2. Ballerup | 37,0 |
| 3. Farum | 35,5 |

### Einstøk úrslit:

| | |
|---|---|
| John Arni | 3,5/7 |
| Heini O. | 4,5/7 |
| Flóvin T. N. | 2/2 |
| Eyðun N. | 4/7 |
| Bogi Z. | 5/7 |
| Jóan H. | 2,5/3 |
| Heini D. | 5/7 |
| Terji P. | 2/5 |
| Carl Eli | 6/7 |
| Finnbjørn V. | 3/4 |

# Tey yngstu skulu ikki kappast

**Arbeiðsbólkur mælir Fótbóltssambandinum til, at fótbóltsliga menningin hjá teimum báðum yngstu skúlaárgangunum fer fram á annan hátt enn í kappingum, har tað ræður um at vinna**

Børnini, sum ganga í fyrsta og í øðrum flokki, skulu ikki kappast í dystum, har tey umboða síni feløg, og har kappingin gongur út upp á at vinna á øðrum liðum og børnum.

Hetta er ein av niðurstøðunum í einum áliti, sum nevndin í Fótbóltssambandinum nú hevur til viðgerðar. Um nevndin í FSF ger av at fylgja tilmælinum verður roknað við, at uppskotið og tilmælið kann gerast til veruleika longu í hesum kappingarárinum.

## Søgan

Á fundinum, sum FSF í november hevði við fótbóltsfeløgini við tí endamáli at taka saman um árið, ið var farið og at seta út í kortið fyri nýggja árið, varð avgjørt – eftir tilmæli frá FSF – at seta ein bólk, hvørs uppgáva tað skuldi vera at endurskoða karmarnar, sum smábørn spæla fótbólt í.

Fýra fólk hava mannað bólkin, sum fyrr í ár var liðugur við arbeiðið. Talan hevur verið um javnstøðu, tí tvey konufólk og tvey mannfólk hava verið í bólkinum. Felags fyri tey øll er, at tey á ein ella annan hátt eru knýtt at fótbóltsumhvørvinum, og so hevur tað verið mett sum ein styrki, at tey hvat arbeiði og útbúgving viðvíkur eru ymisk. Konufólkini í bólkinum hava verið Malan Justinussen, sum er pedagogur, og Tóra Tóroddsdóttir, sum er fysioterapeutur og sum hevur fingist nógv við børn og rørslur.

Mannfólkini í bólkinum hava verið Eli Hentze, fótbóltsspælari og – venjari og fólkaskúlalærari, og Jógvan Martin Olsen, sum í síni tíð spældi nógv fótbólt, og sum tey seinnu árini hevur verið í starvi hjá FSF, har hann er hjálparvenjari hjá Allani Simonsen, umframt at hann hevur høvuðsábyrgdina fyri yngru landsliðini og í fleiri ár hevur verið við til at leggja fótbóltsskúlarnar til rættis.

Úrslitið av arbeinum hjá teimum varð lagt fram, tá FSF og feløgini næstsíðsta vikuskifti høvdu fund um ungdómsfótbóltin.

## Ikki búgvin at kappast

Álitið verður nevnt Yngst 2001. Millum ítøkiligu úrslitini er, at mælt verður til, at inngongdin til fótbóltin verður skipað øðrvísi hjá teimum yngstu, enn hon higartil hevur verið løgd til rættis.

Higartil hevur tað verið soleiðis, at yngstu børnini, sum hava tikið lut í fótbóltinum í FSF høpi, hava verið tey í 1. og 2. flokki. Bólkurin sigur seg einki hava ímóti, at tað framvegis verður soleiðis. Men tey mæla frá, at børnini skulu luttaka á sama hátt, sum tey higartil hava gjørt. Eingin annar skipaður fótbóltur hevur verið, enn kappingarfótbólturin. Tað vil við øðrum orðum siga, at sjey og átta ára gomul børn hava umboðað sítt felag í fótbóltsdystum og fótbóltskappingum ímóti sínum javnaldrum í øðrum feløgum.

Nú verður skotið upp, at í staðin fyri at kappast skulu børnini hittast til samveru, har fótbólturin er í miðdeplinum. Mælt verður til at leggja soleiðis til rættis, at fýra feløg verða í hvørjum bólkinum. Setningurin hjá hvørjum felagnum verður so at bjóða hinum feløgunum til eina stevnu, ið ætlast at verða løgd til rættis á sama hátt, sum fótbóltsskúlarnir plaga at vera. Á hesum stevnunum skulu børnini býtast í bólkar tvørtur um mørkini í feløgunum og tvørtur um kynsmørk. Trivnaðurin skal setast í hásæti, soleiðis at børnini falla til og kenna seg væl í fótbóltsumhvørvinum.

– Menningarliga eru børnini, sum eru sjey og átta ára gomul, ikki komin á eitt støði, har tey eru før fyri at kappast í liðfótbólti. Í kappingum verða tey viðfarin sum smá vaksin fólk. Tí hava tey ikki fyritreytir fyri, hvørki sálarliga, sosialt ella fótbóltsliga. Hesin veruleikin er orsøkin til, at mælt verður til at leggja á annan bógv, er hugburðurin hjá bólkinum.

## Verður tikið í álvara

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sigur, at teir ætlaðu at hava álitið og tilmælið fyri á nevndarfundi í síðstu viku. Men málið stóð so mikið niðarlaga á skránni, at tað varð útsett til næsta fund.

– Mín fatan er, at FSF nevndin tekur undir við tilmælinum at sæð. Tað verður mett at vera rímuligt, at FSF hjálpir feløgunum við hesum.

At tað eftir øllum at døma verður lagt á annan bógv við teimum yngstu ber ikki við sær, at FM kappingarnar í smápiltadeildini og í pinkudeildini detta niðurfyri. Hesar deildirnar hava verið fyri børn í 1., 2. og 3. flokki. Nú verður lagt upp til, at FM kappingarnar bara vera fyri børnini í 3. flokki. **jh**




*Nú fer FSF at gera meira fyri teir ungu fótbóltsleikararnar*

Nr. 57 - 22. mars 2001



## Frá S&K-felagnum

Treytað av nóg góðari undirtøku, verður skipað fyri skeiði í

**Sølu og Tænastu**

3. og 5. apríl 2001
báðar dagarnar frá kl. 13.00 — 17.00.

Skeiðið verður hildið á Føroya Handilsskúla og lærari verður Annfinnur Zachariassen.

**Tilmelding innan 23. mars 2001**

**S&K-felagið**
tlf. 316837 · fax. 310451
e-mail: skfelag@post.olivant.fo

## Bilur við frontskaða til sølu

**Merki:** Hyundai Elantra 1,6
**Árg.:** 2001
**KM:** 1.131

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Beinleiðis tlf. 345727
fax nr. 345607

Fróði Müller
e-mail: fm@trygging.fo
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 08[00]–10[00]
og fríggjadag kl. 08[00]–16[00]

## Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

hevur

**ÁRSAÐALFUND**

**í Skálavík**
**mánadagin 02. apríl kl. 20.00.**

Nærri skrá verður lýst seinni.

**Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag**

## Manning til farmaskip

Til føroyskt farmaskip í millumlandasigling verður søkt eftir royndum skipara við GNDSS, stýrimanni við GNDSS, maskinmanni, kokki og dekkara.

Umframt skulu allir umsøkjarar hava lógarkravdu læknakanning og trygdar-/brandskeið.

**Tlf. 219545 og 422331**

## MANNING

Hervið verður søkt eftir
**manning**
til M/F Norrönu, til summarsiglingina 2001, sum byrjar 19. mai



Størvini, ið sett verða, umfata allar deildir innan catering so sum:

Pursarar, kokkar, bakarar, sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, koytugentur og informatiónsgentur.

**Fylgjandi krevst:**

- **Heilsuprógv** fyri sjófólk, ikki eldri enn 2 ár.
- **Trygdarskeið,** prógv í nýtslu av bjargingarútgerð.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

## 3-ára HF-útbúgving

**á Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Eysturoy**

Treytan av nóg stórari undirtøku og góðkenning frá myndugleikunum verður ein serligur HF-flokkur skipaður frá august 2001, har næmingar kunnu taka útbúgvingina yvir 3 ár.

Lisnir verða umleið 22 tímar um vikuna, og útbúgvingin gevur rætt til stuðul.

Umsóknarfreistin er mánadagin 26. mars 2001, og umsóknarbløð fáast á skúlanum. Lestrarvegleiðararnir eru at hitta á skúlanum.

**Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy**
Kambsdalur
530 Fuglafjørður
Telefon: 444024

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
**RASMUSSEN & WEIHE**

## Tvøroyrar Kommuna

Við hesum verður starv sum verkfrøðingur lýst leyst at søkja.

**Høvuðsverkevni:**
- Projekteringsarbeiði og eftirlit.
- Uppmátingar-, kortleggingar- og skrásetingararbeiði.
- Býar- og byggiplanlegging.
- Málsviðgerð og ráðleggingararbeiði.
- Stýring av kommunalum viðlíkahaldsarbeiði.
- Luttøku í dagligum umsitingarligum uppgávum v.m.

**Førleikakrøv:**
- Verkfrøðingur ella onnur viðkomandi útbúgving.
- Handverksligar royndir.
- Førleiki í projekteringsarbeiði og byggilist.
- Munnligur og skrivligur málførleiki (eisini í enskum).
- Hollur telduførleiki.
- Opin og fyrikomandi.

Løn sambært avtalu við avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til Rasmussen og Weihe á telefon 311017.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera Rasmussen & Weihe í hendi í seinasta lagi 01.05.2001.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

Søkt verður eftir

## Dagrøktarleiðara

til dagrøktarskipanina í Sjóvar Kommunu.

Til starvið krevst námsfrøðilig útbúgving.

Umsóknir til starvið skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2001.

**Sjóvar Kommuna**
490 Strendur